HEILSANIR

Vit bæði vilja við hesum hjartaliga takka tykkum øllum, familju, vinum og kenningum, sum gjørdu hjúnabandsdag okkara, tann 21. desembur 2002, so minniligan og hugnaligan. Stóra takk fyri.
Vinarlig heilsan Mimi og Jan Otto

Góða Edna
Vit ynskja tær tillukku við føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini
Frá Elsu og mamma
PS. Vit gleða okkum til at sleppa biltúr við tær

Góða elskaða Anna
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 14. juni. Muss og klemm
Ynskja mamma, babba og Mattias

Góði allarbesti Fredag
Hjartaliga tillukku við áttatiára føðingardegnum. Gleða okkum at koma í føðingardag hjá tær.
Kærastu heilsanir Birgith og Torkil

Stóra tøkk til øll tykkum,ið gjørdu fermingardag mín ógloymandi. Takk fyri gávur, heilsanir og takk fyri ta stóru hjálp vit fingu til dagin.
Krista Drews Hjartalin

Góði pápi
Hjartaliga tillukku við 34 ára degnum í dag. Eg og mamma elska teg.
Bestu ynskir lítla Jórunn

Góði pápabeiggi, abbabeiggi og langabbabeiggi
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 80 ára føðingardegnum. Harrin signi framtíð tína.
Heilsan Ruth og Tummas við familju

Góði fitti Magnus
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 12. juni. Alt tað besta í framtíðini.
Ynskja mamma, babba, Dánial og Heðin

Góði Elsebeth
Hjartaliga tillukku við 27 ára degnum.
Ynskir systi

Góði abbi og langabbi
Takk fyri góðar túrar vestur á vatni við breyði til dunnurnar.
Heilsan vit Torstein, Martin og Beinir

Góða systi
Hjartaliga tillukku við 27 ára degnum. Nú ert tú gomul, men eg eri størri enn tú :o)
Heilsan beiggi

Allarbesti babba
Eg og mamma ynska tær hjartaliga tillukku við degnum 15. juni, og alt gott í framtíðini. Muss og klemm frá
Meinhard

Góði Jógvan Martin
Vit ynskja tær lukku og gleði á tínum 3 ára degi, og alt tað besta í framtíðini.
Heilsan mamma og babba

Góði langabbabeiggi
Hjartaliga tillukku á áttatiára degnum. Vildu fegin sloppi í føðingardag hjá tær, men mamma sigur, tað er so langt frá Haslev til Klaksvíkar.
Allarbestu heilsur frá Sissal og Herborg

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Gudstænastur Trinitatissunnudagur
Christianskirkjan: kl. 11, lestur
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10,
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30, Elsa Funding
Húsar: kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
Leirvík: kl. 11, altarg., *Funningsfjørður:* kl. 16, altarg., Uni Næs
Kvívík: kl. 12 Marjun Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Glyvrar: kl. 11, Meinhard Bjartalið
Tvøroyri: kl. 11, Jónsvein Bech
Hov: kl. 11,Ólavur Rasmussen
Norðskála: kl. 17 altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
Funningur: kl. 12 messa, Emil Olsen
Eiði: kl. 11, Erland Beder
Gøta: kl. 11, Martin R. Jacobsen. (Sjónvarpsupptøka)
Oyndarfjørður: kl. 12, John S. Myllhamar
Sjóvar kirkja: kl. 11, (triggir kingomenn), Jógvan Fríðriksson
Tjørnuvík: kl. 17, Martin Restorff Jacobsen
Havnar kirkja: kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40, Bjarni Bæk
Hvítanes: kl. 11, Sonja Klein
Miðvágur: kl. 11, Inga Poulsen Dam
Sandur: kl. 12, J. R. Hansen

Katólska kirkjan
Í dag kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsinstænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Um viðrar verður útferð sunnudagin kl. 14.

Bahai-miðstøðin í Havn
Leygardagin 14. juni kl. 20 Altjóða mentanarkvøld við søgum, spølum, myndum og tónleiki frá Kina, Hebridunum og Kenya. Drekkamunnur verður at fáa. Øll eru vælkomin.

Samkoman Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti og kl. 12 Tilbiðjunarmøti, á báðum møtunum talar John Monro og luttøka við kóri úr USA. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum Bøn og Bíbliutími.
Heimasíðan www.livdin.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Pastor Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing. Kl. 11.30 er samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Zacharias Zachariassen talar. www.hebron.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Í dag After Eight: Høllin er opin frá kl. 13-15.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóna Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Samkoman Rhema
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Mervin Gunaselvan av Sri Lanka talar. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 16 Brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 14 Útferð í Havnadal (takið mat við). Um ikki viðrar verða vit í hølum Frelsunarhersins.

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 14. juni kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Vitjan av sangkórinum úr Calvary Bible Church, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúlaútferð, kl. 18 Møti v/ Alfred Hansen.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13
Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Summarkonsertir í Havnar kirkju
Í dag, 14. juni kl. 11.30 verður matiné við Tórshavnar Kamarkóri, sum hesaferð verður stjórnað av Leif Hansen, ið lesur tónleikavísindi í Danmark. Hann er ættaður úr Nólsoy og hevur hetta árið leitt kamarkórið, ið hevur havt fleiri konsertir.

Glæman, Kvívík
Sunnudagin kl. 18 hevur Heimamissiónin møti við Reimund Langgaard úr Leirvík, ung úr Eysturoynni syngja.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Hósvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Haldarsvík
Heimamissiónin hevur útimøti í Haldarsvík leygarkvøldið kl. 20.

Bønhúsið í Søldarfirði
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara.

Missiónshúsið á Selatrað
Sunnudagin kl. 16 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.30 Sangmøti á torginum í Runavík.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Peter Prothero., kl. 17 Barnamøti, kl. 21.30 Sangmøti í bygdarhúsinum á Strondum.
www.keldan.fo

Lívsins Orð, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Sangløta verður á torginum kl. 20.
Mánadagin kl. 20 verður ungdómsmøti við luttøku av Teami frá Apostolisk højskole í Kolding.
Mikukvøldið kl. 20 verður møti við Peter Prothero.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Niels Jacob Nielsen, trúboðara.

Gøta
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við familjuni Brend. Myndir frá Mali verða sýndar. Aftaná verður drekka og hugnaliga samvera.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønar- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

KFUM & K – Norðoyggjar
Fríggjadagin kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta kl. 18 Møti v/ Hjørleif Poulsen, kl. 21 Ungdómsmøti.
Mánadagin kl. 21 samlast Kvinnubíbliubønarbólkurin hjá Sólgerð Joensen, Rættargøta 16.

Getsemane, Klaksvík
Sangkvøld við Jens Lisberg verður leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við André Matras. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin Sunnudagsskúlalega í Kunoy.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Karl og Rona. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 20 Bíbil- bøn og lovsongsløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Magnus Jensen. Øll eru vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Sion, Vágur
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 21 Bønarmøti.
Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

Betania, Sumba
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið í Sandoynni
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00.
Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 16. juni
Upplestur – Poula Olsen lesur upp.
Mikudagin 18. juni
Vit fara til Elduvíkar ein dagstúr. Farið verður úr Missiónshúsinum við bussi kl. 9.45 til Ternuna. Vit eta døgurða uml. kl. 12.30. Á vegnum suðuraftur vitja vit í Kvívík. Kostnaður fyri túrin, flutningur og matur íroknaður er 250 kr. Tilmelding til túrin má gerast innan kl. 12 mánadagin 16. juni í Tilhaldinum ella á tlf. 361990.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 16. juni
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir.
Ólavsøkulistin er komin.
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, telving, dart og onnur spøl. **Tilmelding til urtagarðstúrin mikudagin á tlf. 316491.**
Týsdagin 16. juni:
kl. 10-12 Vit baka til ólavsøku
kl. 10-11.30 Sangur, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
Mikudagin 17. juni:
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14 Urtagarðsvitjan við gartnaranum Michael Jacobæus. Tilm. 316491
Hósdagin 18. juni:
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldupræt, Brandur Petersen
Fríggjadagin 19. juni:
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.